Fiskidagaskipan og umsitingarætlan

Frágreiðing og tilmæli frá arbeiðsbólkinum
at gera uppskot til umsitingarætlan
og at eftirmeta skipanina í fiskiskapinum
eftir botnfiski undir Føroyum

6. mai 2019

Innihald

1. Inngangur 5
2. Tilmæli – samandráttur 6
2.1 Fiskidagaskipan og økisfriðingar 6
2.2 Uppskot til umsitingarætlan 6
3. Fiskidagaskipanin og økisfriðingar 7
3.1 Fiskidagaskipanin frá 1996 7
3.2 Tilmæli um, at fiskidagaskipanin heldur fram 8
3.3 Lógarbroytingar 9
3.4 Samanberandi lýsing av fiskidagaskipan og kvotuskipan 9
3.5 Eftirmeting av fiskidagaskipanini og økisfriðingum í føroyskum sjógvi 11
4. Uppskot til umsitingarætlan og veiðireglu 13
4.1 Inngangur 13
4.2 Virkisøki og endamál 13
4.3 Veiðireglan 14
4.4 Stabilitetsregla 17
4.5 Vísindalig ráðgeving 17
4.6 Avgerðartilgongd 17
4.7 Gildistíð og eftirmeting 18

Fylgiskjal 1. Arbeiðssetningur 19
Fylgiskjal 2: Uppskot til umsitingarætlan og veiðireglu 20
Fylgiskjal 3: Simulering av veiðiregluni – arbeiðsskjal frá Havstovuni 23

1. Inngangur

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum setti á heysti 2018 ein arbeiðsbólk við umboðum fyri vinnuna, Havstovuna og fyrisitingina at gera uppskot til umsitingarætlan fyri fiskiskapin eftir botnfiski undir Føroyum og í tí sambandi eisini eftirmeta skipanina í fiskiskapinum í síni heild. Í arbeiðsbólkin vórðu vald:

Anfinn Olsen[1]	Føroya Reiðarafelag
Hanus Hansen	Føroya Reiðarafelag
Ludvík við Stein	Føroya Reiðarafelag
Hálvdan Gudmundsen	Føroya Reiðarafelag
Gulak Gulaksen	Felagið Trolbátar
Anfinnur Garðalíð	Føroya Skipara- og Navigatørfelag
Jan Højgaard	Føroya Fiskimannafelag
Ólavur Gunnarsson	Maskinmeistarafelagið
Óli Jacobsen	Meginfelag Útróðrarmanna
Petur Steingrund	Havstovan
Jóhan Simonsen	Vørn
Jens Helgi Toftum	Fiskimálaráðið, samskipari

Bólkurin hevði sín fyrsta fund síðst í september 2018. Fram til ársskiftið var uppgávan mest at viðgera og ummæla ætlanirnar og uppskot, sum landsstýrismaðurin hevði um fiskidagar og aðrar reguleringar fyri 2019. Í januar 2019 varð bólkurin skipaður meiri formliga, og ein arbeiðssetningur varð orðaður (skjal 1).

Sambært arbeiðssetninginum er høvuðsuppgávan hjá bólkinum at gera tilmæli um, hvussu vit best fyrisita fiskiskapin eftir botnfiski í føroyskum sjógvi í samsvari við málið um røkt og lívfrøðiliga og búskaparliga burðardygga gagnnýtslu av tilfeinginum.

Arbeiðsbólkurin skal meta um og viðgera ásetingarnar í lógini um fyrisiting av sjófeingi um at fara frá fiskidøgum til kvotur í 2020. Bólkurin skal í hesum sambandi eftirmeta fiskidagaskipanina og aðrar reguleringar í fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi (økisfriðingar, tekniskar reglur um reiðskap o.tíl.). Somuleiðis skulu fyrimunir og vansar við kvotum mótvegis fiskidøgum lýsast. Bólkurin skal gera ítøkilig uppskot um møguligar tillagingar í regluverkinum á økinum. Arbeiðsbólkurin skal eisini gera uppskot um umsitingarætlan(ir) og veiðireglu(r) fyri fiskiskapin eftir botnfiski í føroyskum sjógvi samsvarandi ásetingunum í § 33 í lógini um fyrisiting av sjófeingi og endamálsorðingunum í lógini. Í umsitingarætlanini skulu vera meginreglur og mannagongd fyri at áseta árligu fiskimøguleikarnar í fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi.

Bólkurin skuldi lata landsstýrismanninum frágreiðing og uppskot til umsitingarætlan í seinasta lagi 15. mars 2019. Hendan freistin varð seinni broytt.

[1] Anfinn Olsen fór úr bólkinum, tá hann legði frá sær sum formaður í Reiðarafelagnum í januar 2019.

2. Tilmæli – samandráttur

2.1 Fiskidagaskipan og økisfriðingar

Arbeiðsbólkurin mælir til, at fiskidagaskipan eisini frameftir verður høvuðsamboðið í at stýra fiskiskapinum eftir toski á landgrunninum, hýsu og upsa í føroyskum sjógvi. Ásetingarnar í lógini um fyrisiting av sjófeingi, um at fara frá fiskidøgum til kvotur 1. januar 2020, verða broyttar samsvarandi.

Arbeiðsbólkurin heldur eisini, at økisfriðingar framhaldandi eiga at vera ein partur av fyrisitingini av fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi.

Við orkuni og tíðarkørmunum hevur ikki verið gjørligt hjá arbeiðsbólkinum at eftirmeta fiskidagaskipanina og hinar reguleringarnar, sum í góða fjórðingsøld hava verið grundvøllurin í stýringini av fiskiskapinum eftir botnfiski. Bólkurin mælir til at eftirmeta og eftirhyggja alla skipanina, fyri at fáa eina heildarmynd av, um skipanirnar virka eftir ætlan og tæna endamálinum um burðardygga gagnnýtslu av tilfeinginum.

2.2 Uppskot til umsitingarætlan

Arbeiðsbólkurin hevur uppskot til eina umsitingarætlan, sum skal vera karmurin um fyrisitingina av fiskidagaskipanini.

Umsitingarætlanin ásetir reglur og mannagongd fyri, hvussu vit áseta fiskidagar fyri hvørt fiskiár. Málið er, at vit gagnnýta fiskastovnarnar burðardygt – lívfrøðiliga og búskaparliga.

Bólkurin hugsar sær, at umsitingarætlanin fyrstu ferð verður brúkt, tá fiskidagar verða ásettir fyri 2020.

Bulurin í umsitingarætlanini er ein veiðiregla, sum sigur, hvussu fiskidagatalið verður ásett. Málið er at stýra fiskiskapinum, so at vit eru innan fyri ásett mørk. Veiðireglan leggur upp til, at tað ikki skal vera neyðugt at hækka ella lækka dagatalið á hvørjum ári. Hetta skal bert gerast, um fortreytirnar við fiskastovnunum ella lutfallið millum veiðu og fiskastovn broytast munandi.

Fyri at hava ávísan stabilitet í kørmum og veiðimøguleikum er ásett, at um vit fara út um ásettu mørkini, og dagatalið skal stillast, skal dagatalið verða sett fimm prosent hægri ella lægri enn fiskiárið frammanundan.

Eftir uppskotinum er tað landsstýrismaðurin, sum við kunngerð ásetir fiskidagatal fyri hvørt fiskiár. Hetta skal hann gera við støði í veiðiregluni, vísindaligu ráðgevingini frá Havstovuni og eftir at hava ráðført seg við eina nevnd, sum verður sett við fólki umboðandi allar skipabólkar og veiðihættir í fiskidagaskipanini, umframt fólki frá Havstovuni og fiskiveiðieftirlitinum.

Ein umsitingarætlan hevur eisini týdning, tá vit selja føroyskan fisk og fiskavørur. Gongdin seinastu árini hevur verið, at fiskakeyparar og brúkarar vilja hava váttan fyri, at fiskur og fiskavørur hava uppruna í burðardyggum fiskiskapi. Umsitingarætlanir eru knýttar at teimum góðkenningum, sum Marine Stewardship Council (MSC) og onnur privat feløg lata um burðardyggan fiskiskap og hava tí eisini týdning fyri at varðveita ella sleppa á teir marknaðir, ið geva betri prís.

3. Fiskidagaskipanin og økisfriðingar

3.1 Fiskidagaskipanin frá 1996

Skipanin við fiskidøgum, sum uppskotið frá Skipanarnevndini í 1996 legði lunnar undir, hevur skjótt í eina fjórðingsøld verið høvuðsamboðið at skipa fiskiskapin eftir toski, hýsu og upsa í føroyskum sjógvi. Nógvar av teimum stóru økisfriðingum, sum enn eru galdandi, eru frá somu tíð og vóru ein partur av semjuni í Skipanarnevndini.

Í frágreiðing síni í 1996 helt Skipanarnevndin, at veiðitrýstið kann stýrast við fiskidøgum, og at hetta, saman við økisfriðingum, kann vera grundarlag undir, at veiðitrýstið rakar rætt á teir tríggjar høvuðsbotnfiskastovnarnar. Hugsanin var, at ein tílík skipan, á sama hátt sum kvotur, kann hava tamarhald á royndini hjá fiskiflotanum, so ikki meira enn ásettur partur av stovninum í miðal verður veiddur burturúr á hvørjum ári, og at gýtingarstovnurin verður varðveittur oman fyri ásett minstamark.

Fiskidagaskipanin byggir á útrokningar av veiðievnunum hjá fiskiførum. Veiðievni er eitt mát fyri, hvussu stórt veiðitrýst eitt miðal fiskifar í hvørjum skipabólki fremur hvønn dag. Skipanarnevndin brúkti miðal veiðievni 1985-1994 sum grundarlag. Skipanin og býtið av fiskidøgum millum bólkar varð gjørt soleiðis, at hetta, saman við øðrum reguleringum, skuldi føra til eina burðardygga stovnsstødd og veiðitrýst fyri hvønn stovnin sær.

Heldur enn á hvørjum ári at áseta eina kvotu í tonsum av fiski fyri hvørt fiskaslag út frá ársins stovnsmeting, var hugsanin hjá Skipanarnevndini, at ásett verður eitt fiskidagatal fyri hvønn bólk av fiskiførum, bygt á stovnsmetingar fyri fleiri ár, sum skal tryggja, at heildarveiðitrýstið á teimum trimum týdningarmestu botnfiskastovnunum, ikki fer upp um ásett mark. Skipanarnevndin mælti til, at veiðan í miðal – í tali – ikki fer upp um 33 prosent av stovninum.

Politiska skipanin fylgdi í høvuðsheitum tilmælunum frá Skipanarnevndini, og 1. juni 1996 var fiskidagaskipanin sett í staðin fyri ta kvotuskipan, sum hevði verið síðani summarið 1994.

Fiskidagaskipanin, sum var sett í lógini um vinnuligan fiskiskap, gjørdist tó ikki heilt tann sama, sum uppskotið frá Skipanarnevndini legði upp til. Eitt nú var talið á fiskidøgum frá byrjan væl størri, enn mælt var til í frágreiðingini hjá Skipanarnevndini. Harumframt mælti

Skipanarnevndin til egnar fiskidagar, og at tað skuldi bera til frítt at umseta dagarnar, men longu frá byrjan, og sum frá leið, vóru møguleikarnir fyri at avhenda fiskidagar nógv skerdir.

Fiskidagaskipanin hevur verið síðani 1996. Eftir lógini um vinnuligan fiskiskap ásetti Løgtingið fyri hvørt fiskiár eitt hámark fyri, hvussu nógvar dagar skip og bátar kundu royna.

Mannagongdin var, at á hvørjum ári skuldi Havstovan lata landsstýrismanninum stovnsmetingar, tilmæli um fiskidagar komandi fiskiárið, umframt tilmæli um, hvussu fiskiskapurin skuldi skipast. Harafturat skuldi Fiskidaganevndin, sum var mannað við umboðum fyri vinnuna á sjónum, hvørt ár lata landsstýrismanninum samsvarandi tilmæli.

Í lógini um fyrisiting av sjófeingi helt fiskidagaskipanin fram. Bæði fyri 2018 og fyri 2019 er tað Løgtingið, sum við lóg hevur ásett fiskidagatalið. Ásetta fiskidagatalið er bæði árini tað sama sum í fiskiárinum 2016/2017. Mannagongdin við ráðgeving og tilmælum frá Havstovuni og Fiskidaganevndini er tó ikki longur partur av sjálvari lógini.

3.2 Tilmæli um, at fiskidagaskipanin heldur fram

Arbeiðsbólkurin mælir til at halda fast við meginreglurnar og høvuðstættirnar í verandi fiskidagaskipan. Hetta ber í sær, at ásetingin í lógini um fyrisiting av sjófeingi, um at kvotuskipan verður sett í verk í fiskiskapinum eftir botnfiski frá 1. januar 2020, verður broytt samsvarandi.

Bólkurin heldur, at ein fiskidagaskipan, ið verður fyrisitin eftir tí umsitingarætlan, sum arbeiðsbólkurin hevur uppskot um, er betri hóskandi at brúka í blandingsfiskiskapinum eftir toski, hýsu og upsa í føroyskum sjógvi enn ein kvotuskipan.

Hetta merkir ikki, at verandi fiskidagaskipan er lýtaleys. Tí mælir bólkurin eisini til, at øll skipanin verður eftirmett.

Tilmælið um fiskidagaskipan ber í sær, at grundreglurnar og høvuðstættirnir í verandi fiskidagaskipan verða varðveittar. Fiskidagatal verður ásett fyri hvørt fiskiár, og dagarnir verða býttir millum somu bólkar, sum eru í skipanini í dag.

Tilmælið leggur tó upp til tvær høvuðsbroytingar í fyrisitingini av fiskidagaskipanini: Tann fyrra er, at karmurin um at áseta fiskidagar verður ein politiskt góðkend umsitingarætlan, sum ásetir reglur og mannagongd fyri, hvussu árliga fiskidagatalið verður sett.

Hin broytingin er, at tað verður landsstýrismaðurin, sum við kunngerð ásetir fiskidagatal fyri hvørt fiskiár. Hetta skal hann gera við støði í umsitingarætlanini, vísindaligu ráðgevingini frá Havstovuni og eftir at hava ráðført seg við eina nevnd umboðandi allar skipabólkar og veiðihættir í fiskidagaskipanini, umframt fólki frá Havstovuni og fiskiveiðieftirlitinum.

Í hvørjum bólki verða dagarnir framvegis tillutaðir rættindahavarum sum egnir fiskidagar, undantikið í bólki 5, sum fær felags fiskidagar.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at reglurnar fyri at avhenda fiskidagar verða endurskoðaðar, so at fiskidagar, sum ikki verða brúktir, verða lættari atkomiligir hjá øðrum rættindahavarum í sama bólki, sum hava tørv á fiskidøgum.

3.3 Lógarbroytingar

Um tilmælini hjá arbeiðsbólkinum fáa politiska undirtøku, er neyðugt at tillaga lógina um fyrisiting av sjófeingi. Arbeiðsbólkurin hevur ikki gjørt ítøkiligt og liðugt uppskot um broytingar í lógini, men í stuttum er talan um hesar broytingar:

1. Kapittul 4 (greinarnar 22-27 og greinarnar 29-32) í lógini um sjófeingi verður broyttur, so at allar ásetingar um mest loyvdu veiðu og kvotur verða strikaðar, og ásetingar um fiskidagar settar ístaðin. Lógarteksturin verður orðaður soleiðis, at tað er landsstýrismaðurin, sum fyri hvørt fiskiár við kunngerð ásetir fiskidagar eftir mannagongd og reglum í umsitingarætlanini. Bólkarnir vera óbroyttir, og fiskidagar verða ásettir fyri somu bólkar, sum eru í verandi lóg.

2. Harnæst verður grein 33 um umsitingarætlan og veiðireglur broytt og lagað til eina fiskidagaskipan.

3. Kapittul 16 (greinarnar 73-80) verður strikaður. Hesin kapittul í lógini er mest av fyribils slag og er eitt úrslit av, at gjørt varð av at útseta kvotuskipanina, og at fiskidagaskipan skuldi halda fram, fyrst fyri 2018 og seinni fyri 2019. Tær greinar í kapitli 16, sum snúgva seg um avhending og flyting av fiskidagarættindum, verða tó fluttar til kapittul 4, samstundis sum reglurnar verða broyttar, so at óbrúktir fiskidagar í hvørjum bólki verða lættari atkomuligir hjá øðrum í bólkinum, sum hava tørv á døgum.

3.4 Samanberandi lýsing av fiskidagaskipan og kvotuskipan

Samsvarandi arbeiðssetninginum er her hugt at fyrimunum og vansum við kvotum mótvegis fiskidøgum.

Hjáveiða og útblak

Størsta styrkin við fiskidagaskipanini er, at tá einki hámark er sett fyri veiðuni, kunnu øll sløg og allar nøgdir avreiðast. Í skipanini er lítil eggjan til at blaka veiðu útaftur, ella til at umdoypa fisk fyri at halda seg til ásettar kvotur. Sostatt eru veiðitølini álítandi. Tó kann "high-grading" koma fyri, m.a. við, at undirmálsfiskur ikki verður landaður, og tískil kann hann vera undirumboðaður í avreiðingartølunum.

Hinvegin er helst størsti veikleikin við kvotuskipanum, at vandin er stórur fyri, at veiða verður blakað út ella umdoypt, serliga tá kvoturnar eru smáar. Eisini er vandi fyri 'high-grading', tað vil t.d. siga, at smáur fiskur verður blakaður út, tí betri prísur fæst fyri størra fiskin.

Stýring av veiðitrýsti

Ein veikleiki við fiskidagaskipanini er, at tað kann vera torført at stýra veiðitrýstinum, tí fiskidagarnir verða ikki latnir til einstakt fiskaslag. Í blandingsfiskiskapi kann veiðitrýstið gerast lutfalsliga stórt á fiskasløg, sum eru illa fyri. Við fiskidagaskipan er vanliga veikt samband millum ásettu fiskidagarnar og veiðitrýstið á stovnarnar. Rættiliga líkt dagatal kann taka nógv størri prosentpart av stovninum onkur ár enn onnur, og hetta kann elva til øktan vanda fyri, at vit ganga stovnunum ov nær, av tí at torført er at stýra veiðitrýstinum, serliga, tá ið stovnar eru í minking.

Við eini kvotuskipan ber í prinsippinum betur til at stýra veiðitrýstinum á einstøk fiskasløg, tí tilmæli og fiskirættindi verða givin fyri hvørt slagið sær. Við kvotuskipanum er vanliga gott samsvar millum hámark og veiðitrýst á fiskastovnarnar, og sostatt er lættari at stýra veiðitrýstinum, um ein stovnur til dømis minkar. Í fyrsta lagi, tí at kvotur eru givnar fyri hvørt fiskaslag sær, og í øðrum lagi, tí at tað ber til at fylgja við, um og nær kvotan er uppfiskað.

Effektivitetsøkingar

Við eini skipan við hámarksveiðu hevur tað minni týdning fyri fiskastovnin og veiðitrýstið, um effektiviteturin í flotanum broytist við størri førum ella betri reiðskapi og tekniskari útgerð. Effektivitetsøkingin ger sum oftast, at tú fært fiskað somu nøgd skjótari og effektivari. Tá hámarksveiðan er rokkin, steðgar fiskiskapurin.

Í eini fiskidagaskipan ber bert til at leggja upp fyri effektivitetsøking við at taka dagar úr skipanini, soleiðis at samlaðu veiðievnini hjá flotanum eru óbroytt.

Búskaparlig burðardygd

Øll fiskidagaskipanin er gjørd við støði í einum søguligum flotabygnað (1984-1994), og skal skipanin tæna stovnsrøktini, er alla tíðina neyðugt at tryggja, at fiskiorkan og veiðievnini ikki gerast størri. Hetta hevur millum annað verið gjørt við reglum, ið áseta fiskiorku við støði í skipastødd og maskinorku soleiðis, at tá tú til dømis flytur fiskidagar á størri og effektivari skip, verður dagatalið at flyta skert fyri at leggja upp fyri, at veiðievnini ikki skulu gerast størri. Hetta avmarkar. Tí verður ofta ført fram, at fiskidagaskipanin búskaparliga sæð er ein stirvnari skipan, tí møguleikarnir hjá vinnuni búskaparliga at tillaga, effektivisera og optimera raksturin ikki eru teir somu sum í eini kvotuskipan.

Í eini skipan við hámarksveiðu og kvotum eru fyritreytirnar øðrvísi. Tað ger tað sama, um tú fiskar tína kvotu við einum stórum skipi ella einum minni skipi. Verða kvoturnar latnar sum eginkvotur og eru umsetiligar, gevur hetta rættindahavarum rúmari møguleikar til at tillaga og optimera fiskiskapin og veiðitól, tí ein er ikki avmarkaður av treytum í regluverkinum um skipastødd, maskinorku o.a.

Fiskiveiðieftirlit

Eftirlit undir eini skipan við fiskidøgum er einfaldari enn í eini kvotuskipan, serliga tí at ongar eggjanir eru til at snýta við upplýsingum um veiðitøl og at blaka fisk útaftur. Í fiskidaga-skipanini snýr tað seg mest um at hava eftirlit við fiskidagatalinum og veiðiorkuni.

Í skipanum við hámarksveiðu og kvotum eru krøvini til eftirlit øðrvísi. Her krevst ofta betri eftirlit fyri at tryggja, at fiskifør halda seg til ásettar kvotur, og at tey ikki blaka fisk útaftur fyri at kunna halda ásetta kvotu og bert taka tann fisk ella ta fiskastødd til lands, ið gevur besta avreiðingarvirðið. Eftirlit skal eisini vera við veiðitølum á skipum og landingarstøðum fyri at fáa vissu fyri, at alt er rætt upplýst og avstaðfarið við veiðidagbókum, landingum, hagreiðing og virking umborð.

3.5 Eftirmeting av fiskidagaskipanini og økisfriðingum í føroyskum sjógvi

Eftir arbeiðssetninginum skal arbeiðsbólkurin eftirmeta dagaskipanina og aðrar reguleringar í fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi.

Við orkuni og tíðarkarminum hevur bólkurin ikki sæð seg føran fyri at gera eina slíka eftirmeting á nøktandi og fullgóðan hátt. Arbeiðsbólkurin hevur tí heldur ikki gjørt ítøkilig tilmæli um grundleggjandi broytingar í fiskidagaskipanini ella økisfriðingum.

Botnfiskiskapurin undir Føroyum hevur í skjótt fjórðingsøld verið umsitin undir tí skipan við fiskidøgum, sum uppskotið frá Skipanarnevndini legði lunnar undir í 1996. Skipanarnevndin gjørdi longu í frágreiðing síni í 1996 vart við, at av tí, at skipanin ikki er roynd aðrastaðni, er umráðandi, at royndirnar við skipanini gjølla verða kannaðar og mettar móti endamálinum.

Ein heildarmeting av allari skipanini í fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi er alneyðug, og arbeiðsbólkurin mælir til, at tíð og orka verður sett av til at gera eina slíka eftirmeting. Høvuðsendamálið er at vita, um skipanin virkar eftir ætlan, og um hon stuðlar undir góða stovnsrøkt, og at vit gagnnýta tilfeingið soleiðis, at vinnan og samfelagið fær sum mest burturúr. Eftirmetingin skal lýsa, hvussu gongdin hevur verið við veiðievnum og at kanna sambandið millum veiðitrýst, veiðievni og fiskidagar.

Í eftirmetingini eiga allir tættir í fiskidagaskipanini og umsitingini av henni at takast upp.

Ein av høvuðsuppgávunum í eftirmetingini er við nýggjari tølum at endurtaka roknistykkið, sum Skipanarnevndin hevði sum grundarlag fyri at áseta fiskidagar í 1996. Fiskiorkunevndin setti sær í 2008 fyri at gera roknistykkið av nýggjum við tilfari frá 1997-2007, men sum skilst, bar hetta ikki til millum annað tí, at hagtalsgrundarlagið ikki var mett nóg gott.

Arbeiðsbólkurin hevur í sambandi við eina eftirmeting m.a. umrøtt skipanina við innaru og ytru fiskidagaleið. Í verandi skipan eru ásettu fiskidagarnir galdandi fyri fiskiskap á innaru fiskidagaleið. Í bólkunum 2, 3, 4 A, 4 B og 4 T, sum hava egnar fiskidagar, kunnu dagarnir býtast um til fiskiskap á ytru fiskidagaleið við lutfallinum 1:3.

Á ytru fiskidagaleið er tað vanliga annar fiskur, enn tann, ið dagarnir verða settir fyri á innaru fiskidagaleið, ið skipini royna eftir. Húkaflotan fiskar til dømis brosmu og longu, men eisini tosk á Íslandsrygginum. Hesin fiskiskapur og rættindi verða stýrd við ásetingin av fiskidøgum fyri tosk, hýsu og upsa á innaru leið. Um til dømis dagatalið á innaru leið verður lækkað, tí toskastovnurin á landgrunninum verður mettur at vera illa fyri, fáa rættindahavarar færri

dagar á innaru leið. Men færri dagar á innaru leið ger samstundis, at dagarnir verða færri á ytru fiskidagaleið, uttan at hetta nýtist at vera lívfrøðiliga grundað. Spurningurin er, um tað er rætt, at stillingar í fiskidøgum á innaru leið eisini skulu avgera fiskimøguleikarnar í fiskiskapinum á ytru fiskidagaleið.

Arbeiðsbólkurin hevur eisini umrøtt reglur fyri at skráseta og gera upp fiskidagar í bólki 5, útróðrarbátar undir 15 tons, og mælir til, at hetta eisini verður partur av eftirmetingini. Eftir verandi skipan fyri bólk 5, sum fiskar av felags fiskidøgum, telur hvør túrur (avreiðing) ein fiskidag, hóast túrurin er longri enn 24 tímar. Fyri øll onnur verður daganýtslan roknað frá tí farið verður úr havn, til komið er aftur í havn. Nevnast kann eisini, at reglurnar um umbýti av døgum millum innaru og ytru fiskidagaleið galda ikki fyri bólk 5.

Harumframt skjýtur arbeiðsbólkurin somuleiðis upp, at hugt verður eftir bólkunum og upp-býtinum í bólkar í fiskidagaskipanini. Í verandi skipan er flotin býttur upp í bólkar, og dagarnir knýttir at ávísum bólki. Bólkingin er grundað á, hvussu heimaflotin sá út í 1980-unum og fyrst í 1990-unum. Broytingar hava verið síðani tá – kanska mest í útróðrarflotanum.

Eins og fiskidagaskipanin eru flestu av teimum stóru økisfriðingunum frá 1990-unum. Onkur friðing er broytt nakað, og onkrar eru komnar afturat hesi árini, men sjálvur grundvøllurin í skipanini við økisfriðingum hevur verið óbroyttur seinastu 20-25 árini.

Tá økisfriðingar eru settar í verk, hava endamálini verið ymisk. Í summum førum er enda-málið mest stovnsrøkt. Dømi eru gýtingarfriðingar, ungfiskareglur og bráðfeingis veiðibann og friðaðar smáfiskaleiðir. Í øðrum førum hevur fremsta endamálið verið at halda atskildar veiðihættir, sum illa fáa roynt á somu leið samstundis uttan ampa hvør av øðrum.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at tað arbeiðið, sum var sett í gongd fyri nøkrum árum síðani at hyggja at stongdum leiðum, heldur fram. Eitt gott støði undir hesum arbeiði er frágreiðingin um friðaðar og stongdar leiðir, sum var latin Fiskimálaráðnum í 2014.

4. Uppskot til umsitingarætlan og veiðireglu

4.1 Inngangur

Arbeiðsbólkurin hevur gjørt uppskot um at skipa fiskiskapin eftir toski á landgrunninum, og hýsu og upsa í føroyskum sjógvi í eina umsitingarætlan við serligari veiðireglu. Uppskotið er gjørt til ta fiskidagaskipan, sum arbeiðsbólkurin mælir til skal vera høvuðsamboðið í stýringini av fiskiskapinum.

Umsitingarætlanin ásetir reglur og mannagongd fyri, hvussu fiskidagatalið verður ásett fyri hvørt fiskiár. Fremsta endamálið er stovnsrøkt. Málið er, at fiskastovnarnir varandi skulu kunna endurnýggja seg og kasta sum mest av sær.

Men umsitingarætlanin ásetir eisini, at fiskidagatalið ikki skal sveiggja ov nógv frá einum fiskiári til næsta. Broytast fyritreytirnar nógv, eitt nú tá fiskastovnarnir fara niður um vanda-mark, skulu inntriv og stillingar ikki gerast í einum, men yvir eitt áramál.

Við umsitingarætlanini verður miðað ímóti langtíðarhugsan, fyrst og fremst í stovnsrøktini, men eisini soleiðis, at rættindahavarar rímiliga tíð frameftir vita, hvussu fyritreytirnar og karmarnir verða.

Umsitingarætlanin snýr seg mest um, hvussu vit áseta fiskidagar fyri hvørt fiskiár. Men í stýringini av fiskiskapinum eftir toski, hýsu og upsa skal eisini frameftir bera til at brúka stongdar og friðaðar leiðir, hjáveiðireglur, reglur um reiðskap o.a. í stovnsrøktini.

Ein treyt fyri, at ein umsitingarætlan skal virka, er, at hon er kjølfest í politiskum langtíðarsemjum – tvørtur um samgongur og valskeið.

Vert er eisini at nevna, at ein góðkend umsitingarætlan hevur týdning, tá vit marknaðarføra og selja føroyskan fisk og fiskaúrdrátt á teimum marknaðum, ið geva betri prís. Gongdin seinastu árini hevur verið, at keyparar og brúkarar vilja hava trygd fyri, at fiskur hevur sín uppruna úr burðardyggum fiskiskapi. Privat feløg, t.d. MSC (Marine Stewardship Council), bjóða seg fram fyri keyparum at góðkenna, at vørurnar lúka hesar treytir. Ein umsitingar-ætlan er vanliga knýtt at slíkum góðkenningum og hevur tí týdning fyri at varðveita ella sleppa inn á teir marknaðir, ið geva betri prís.

Niðanfyri eru høvuðstættirnir í uppskotinum til umsitingarætlan lýstir nærri. Sjálvt uppskotið til umsitingarætlan og veiðireglu er í skjali 1.

4.2 Virkisøki og endamál

Umsitingarætlanin er karmurin um at fyrisita fiskidagaskipanina, sum skipar fiskiskapin eftir toski á landgrunninum, hýsu, og upsa í føroyskum sjógvi. Ætlanin sigur, hvussu vit áseta árliga fiskidagatalið. Hon skal stuðla undir, at vit fyrisita fiskiskapin í samsvari við málið um góða stovnsrøkt og lívfrøðiliga og búskaparliga burðardygga gagnnýtslu av tilfeinginum.

4.3 Veiðireglan

Bulurin í ætlanini er veiðireglan, sum sigur, hvussu árliga fiskidagatalið verður ásett. Málið er at stýra fiskiskapinum (veiðitrýstinum), so at vit eru innan fyri ásett mørk, sum skulu tryggja, at fiskastovnarnir varandi skulu kunna endurnýggja seg og kasta sum mest av sær.

Veiðireglan er eitt slag av tilbúgving, sum sigur, at okkurt skal gerast, tá ávaringarljósini lýsa, og vandi er fyri, at vit fara út um ásettu mørkini.

Tvey tilvísingarvirði eru í veiðiregluni.

1. *Gýtingarstovnurin* er tann parturin av einum fiskastovni, ið er gýtingarførur. Veiðireglan leggur upp til, at fiskidagatalið verður skert, um gýtingarstovnurin er niðan fyri ásetta lágmarkið í veiðiregluni (ICES SSB $B_{trigger}$). Er stovnurin væl fyri og royndin óbroytt, verður fiskidagatalið óbroytt ella hækkað.

2. *Veiðilutfallið* er veiða í mun til fiskibaran stovn. Hetta er eitt slag av "harvest rate". Fiskibarur stovnur er biomassin av 3+ ára gomlum fiski (toskur/hýsa) ella biomassi av 4+ ára gomlum fiski (upsi).

Talvan niðanfyri vísir tey tilvísingarvirði, sum verða brúkt í uppskotinum til veiðireglu.

Tilvísingarvirði í veiðiregluni

Fiskastovnur	Veiðilutfall, lágmark	Veiðilutfall, hámark	Gýtingarstovnur, lágmark, $B_{trigger}$, tons
Toskur á landgrunninum	0,24	0,31	29.226
Hýsa	0,17	0,30	22.843
Upsi	0,26	0,33	55.000

Veiðireglan leggur upp til, at tað ikki skal vera neyðugt at stilla dagatalið á hvørjum ári.

Fiskidagatalið verður lækkað, um gýtingarstovnurin er undir lágmarkinum *ella,* um veiðilutfallið er oman fyri ásett hámark.

Fiskidagatalið verður hækkað, um gýtingarstovnurin er oman fyri lágmarkið *og* veiðilutfallið er niðan fyri ávíst lágmark.

Fiskidagatalið verður óbroytt, um gýtingarstovnurin er oman fyri lágmarkið, *og* veiðilutfallið millum veiðu og fiskibaran stovn er millum hámarkið og lágmarkið.

Myndin á næstu síðu tekur samanum, hvussu farið verður fram, og hvat ein skal halda seg til, tá fiskidagatal skal ásetast fyri eitt fiskiár.

Sum tað sæst, er veiðireglan í tveimum. Skilt verður ímillum fiskidagar til upsa og fiskidagar til tosk/hýsu, og at tað skal bera til at stilla dagarnar fyri ávikavist bólk 2 og bólkarnar 3-5 alt eftir, hvussu stovnarnir eru fyri. Vísir tað seg til dømis, at upsastovnurin verður mettur at vera væl fyri, so kann dagatalið hækkast fyri bólk 2, ið vanliga mest fiskar upsa.

Beint nú ber illa til at siga neyvt, hvussu gongdin verður við fiskidagatalinum undir veiðiregluni tey næstu árini. Hetta veldst nógv um, hvussu stovnarnir til einhvørja tíð eru fyri, og hvussu nógv vit fiska.

Í løtuni eru til dømis toskastovnurin og hýsustovnurin væl fyri. Bæði stovnur og royndin er innan fyri markvirðini í veiðiregluni. Tí verður neyvan talan um til dømis at skerja dagatalið tey fyrstu árini.

Simuleringar við veiðiregluni geva ábendingar um, at ta fyrstu tíðina kann veiðireglan gera, at dagatalið í bólkunum 3-5 hækkar nakað, meðan dagatalið í bólki 2 verður lækkað nakað. Hetta er tó knýtt at stórari óvissu og skal takast við øllum fyrivarni.

Somuleiðis benda simuleringarnar á, at við veiðiregluni verður gongdin, at tað í nøkur ár verða hækkingar í dagatalinum, nøkur ár við óbroyttum dagatali og nøkur ár, har dagatalið verður lækkað.

Hetta hevur eisini samanhang við stabilitetsregluna í veiðiregluni, sum sigur, at hóast stórar broytingar verða staðfestar í veiðigrundarlagnum, ið tala fyri stórum inntrivum, so skulu inntriv og stillingar ikki gerast í einum. Fiskidagatalið skal bert broytast við fimm prosentum frá einum ári til næsta.

Fortreyt fyri, at veiðreglan kann virka er, at sambandið millum brúktar fiskidagar og veiðilutfallið (t.e. veiða í mun til fiskibaran stovn) ikki broytist.

Hetta er í ein ávísan mun lagt upp fyri við sjálvari veiðiregluni, tí ein øktur effektivitetur og økt veiðievni kunnu gera, at vit við tíðini koma undir lágmarkið fyri gýtingarstovnin og upp um hámarkið fyri veiðilutfall. Sambært veiðiregluni skal dagatalið í slíkum førum skerjast við fimm prosentum.

Veiðireglan
Bólkur 2 – upsi

Fiskidagatalið verður hækkað	Fiskidagatalið verður óbroytt	Fiskidagatalið verður lækkað
• Gýtingarstovnurin av upsa er oman fyri lágmark • Veiðilutfall av upsa er niðan fyri lágmark • Báðar treytir mugu vera galdandi, um fiskidagatalið skal hækka	• Gýtingarstovnurin av upsa er oman fyri lágmark • Veiðilutfall av upsa er millum lág- og hámark	• Gýtingarstovnurin av upsa er niðan fyri lágmark • Veiðilutfallið av upsa er oman fyri hámark • Um onnur av treytunum er galdandi, skal fiskidagatalið lækka

Veiðireglan
Bólkur 3 – 5, toskur og hýsa

Fiskidagatalið verður hækkað	Fiskidagatalið verður óbroytt	Fiskidagatalið verður lækkað
• Gýtingarstovnurin av **bæði** toski og hýsu er oman fyri lágmark • Veiðilutfallið er niðan fyri lágmark **bæði** fyri tosk og hýsu • Báðar treytir mugu vera galdandi, um fiskidagatalið skal hækka	• Gýtingarstovnurin av **bæði** toski og hýsu er oman fyri lágmark • Veiðilutfallið er millum lágmark og hámark fyri **bæði** tosk og hýsu	• Gýtingarstovnurin av toski **ella** hýsu er niðan fyri lágmark • Veiðilutfallið er oman fyri hámark fyri antin tosk **ella** hýsu • Um onnur av treytunum er galdandi, skal fiskidagatalið lækka

Fortreyt fyri, at veiðreglan kann virka er, at sambandið millum brúktar fiskidagar og veiðilutfallið (t.e. veiða í mun til fiskibaran stovn) ikki broytist.

Hetta er í ein ávísan mun lagt upp fyri við sjálvari veiðiregluni, tí støðugt økt veiðievni kunnu gera, at vit við tíðini koma undir lágmarkið fyri gýtingarstovnin og upp um hámarkið fyri veiðilutfall. Sambært veiðiregluni skal dagatalið í slíkum førum skerjast við fimm prosentum.

Øktur effektivitetur kann vera eitt úrslit av tøkniligum broytingum í reiðskapi, sum ávirkar veiðievnini. Slíkar broytingar henda vanliga í lopum.

Øktur effektivitetur, sum ávirkar veiðievnini, kann koma av, at fiskifør megna at fáa meira burturúr hvørjum fiskidegi, ella at fiskidagar verða fluttir at brúka við øðrum effektivari fiskifari. Tí hevur tað eisini týdning fyri umsitingarætlanina og stovnsrøktina, at regluverkið um fiskiorku og flyting av døgum millum fiskifør megnar at leggja upp fyri, at veiðievnini ikki gerast størri, hóast samlaða fiskidagatalið er óbroytt.

4.4 Stabilitetsregla

Uppskotið til umsitingarætlan leggur upp til, at um vit fara út um ásettu mørkini, verður fiskidagatalið bert stillað við fimm prosentum hægri ella lægri enn fiskiárið frammanundan, hóast støðan kann tala fyri størri inntrivum. Endamálið við hesum er at hava ávísan stabilitet í kørmunum og veiðimøguleikunum.

4.5 Vísindalig ráðgeving

Havstovan stendur fyri vísindaligu ráðgevingini í sambandi við veiðiregluna, t.e. ráðgeving, ið er lagað til fiskidagaskipanina. Havstovan ger í november á hvørjum ári stovnsmetingar fyri tosk, hýsu og upsa og ráðgevur landsstýrismanninum um fiskidagatal fyri komandi árið við støði í veiðiregluni. Ráðgevingin kann eisini fevna um onnur stovnsrøktarátøk, økisfriðingar, reiðskapsreglur o.tíl.

4.6 Avgerðartilgongd

Bæði í gomlu lógini um vinnuligan fiskiskap og í sjófeingislógini er tað Løgtingið, ið hevur ásett fiskidagatalið við lóg fyri eitt ár í senn. Uppskotið frá arbeiðsbólkinum er, at tað frameftir er landsstýrismaðurin, sum ásetir fiski-dagarnar í kunngerð fyri hvørt fiskiár. Hetta skal hann gera við støði í umsitingarætlanini, vísindaligu ráðgevingini frá Havstovuni og eftir at hava ráðført seg við nevndina, umboðandi allar skipabólkar og veiðihættir í fiskidagaskipanini, umframt fólki frá Havstovuni og fiskiveiðieftirlitinum.

4.7 Gildistíð og eftirmeting

Hetta er fyrstu ferð, at ein umsitingarætlan verður gjørd og roynd fyri botnfisk undir Føroyum. Tí kann hugsast, at óvæntaðar ella ótilætlaðar støður stinga seg upp, sum gera tað neyðugt at gera tekniskar stillingar í skipanini ta fyrstu tíðina.

Men grundhugsanin er, at umsitingarætlanin/veiðireglan skal byggja á breiðar, politiskar langtíðarsemjur um, hvussu vit fyrisita fiskidagaskipanini, sum gera, at skipanin ikki verður broytt grundleggjandi í tíð og ótíð. Slíkar broytingar skulu bert gerast, um grundarlagið undir og fyritreytirnar fyri skipanini broytast avgerandi.

Arbeiðsbólkurin hugsar sær, at um uppskotið fær politiska undirtøku, eigur umsitingar-ætlanin og veiðireglan at fáa gildi beinanvegin, so hon kann verða brúkt, tá fiskidagar skulu ásetast fyri fiskiárið 2020.

Veiðireglan skal eftirmetast í minsta lagi triðja hvørt ár, fyrstu ferð, áðrenn fiskidagar verða ásettir fyri fiskiárið 2023. Ein fyritreyt fyri eftirmeting er, at góð hagtøl og skrásetingar eru tøk um veiðu, fiskileiðir, fiskiorku, veiðievni o.s.fr. Yvirskipaða málið er eisini, at ein til einhvørja tíð lætt og ómakaleyst fær tikið pulsin á skipanini.

Fylgiskjal 1. Arbeiðssetningur

Arbeiðsbólkur at gera tilmæli um skipan í fiskiskapinum eftir botnfisk í føroyskum sjógvi

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur sett ein arbeiðsbólk við umboðum fyri vinnuna, Havstovuna og fyrisitingina at gera uppskot til umsitingarætlan fyri fiskiskapin eftir botnfiski undir Føroyum, og í tí sambandi eisini eftirmeta skipanina í fiskiskapinum í síni heild.

Í arbeiðsbólkinum eru:

Anfinn Olsen	Føroya Reiðarafelag
Hanus Hansen	Føroya Reiðarafelag
Ludvík við Stein	Føroya Reiðarafelag
Hálvdan Gudmundsen	Føroya Reiðarafelag
Gulak Gulaksen	Felagið Trolbátar
Anfinnur Garðalíð	Føroya Skipara- og Navigatørfelag
Jan Højgaard	Føroya Fiskimannafelag
Ólavur Gunnarsson	Maskinmeistarafelagið
Óli Jacobsen	Meginfelag Útróðrarmanna
Petur Steingrund	Havstovan
Jóhan Simonsen	Vørn
Jens Helgi Toftum	Fiskimálaráðið, samskipari

Arbeiðssetningur

Høvuðsuppgávan hjá arbeiðsbólkinum er at gera tilmæli um, hvussu vit best fyrisita fiskiskapin eftir botnfiski í føroyskum sjógvi í samsvari við málið um røkt og lívfrøðiliga og búskaparliga burðardygga gagnnýtslu av tilfeinginum.

Ítøkiligu uppgávurnar eru hesar:

1. Arbeiðsbólkurin skal meta um og viðgera ásetingarnar í lógini um fyrisiting av sjófeingi um at fara frá fiskidøgum til kvotur í 2020. Bólkurin skal í hesum sambandi eftirmeta fiskidagaskipanina og aðrar reguleringar í fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi (økisfriðingar, tekniskar reglur um reiðskap o.tíl.). Somuleiðis skulu fyrimunir og vansar við kvotum mótvegis fiskidøgum lýsast. Bólkurin skal gera ítøkilig uppskot um møguligar tillagingar í regluverkinum á økinum.

2. Arbeiðsbólkurin skal gera uppskot um umsitingarætlan(ir) og veiðireglu(r) fyri fiskiskapin eftir botnfiski í føroyskum sjógvi samsvarandi ásetingunum í § 33 í lógini um fyrisiting av sjófeingi og endamálsorðingunum í lógini. Í umsitingarætlanini skulu vera meginreglur og mannagongd fyri at áseta árligu fiskimøguleikarnar í fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi.

Arbeiðsætlan og tíðarætlan

Bólkurin ger av, hvussu hann skipar arbeiðið. Fólk frá Fiskimálaráðnum samskipar arbeiðið. Skriviuppgávur verða røktar av fólki frá Fiskimálaráðnum og stovnum tess, sum eisini taka sær av at útvega bólkinum tilfar, at lýsa og greina spurningar o.tíl. Bólkurin kann eftir tørvi leita sær hjálp uttanífrá.

Arbeiðsbólkurin letur landsstýrismanninum frágreiðing og uppskot til umsitingarætlan(ir) í seinasta lagi 15. mars 2019.

Fylgiskjal 2: Uppskot til umsitingarætlan og veiðireglu

Virkisøki

Henda umsitingarætlan fevnir um fiskiskapin eftir toski á landgrunninum, hýsu og upsa í føroyskum sjógvi, sum er skipaður við fiskidagaskipan.

Fyrisiting

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum fyrisitur fiskiskap eftir botnfiski (fiskidagaskipanina) við teimum heimildum, Løgtingið hevur givið við løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi.

Fiskiveiðiskipan

Fiskiskapurin eftir høvuðsfiskasløgunum toskur á landgrunninum, hýsa og upsi í føroyskum sjógvi, verður skipaður við fiskidøgum. Fyri hvørt fiskiár verður ásett fiskidagatal, sum verður býtt út á bólkar av rættindahavarum/fiskifórum, ásettir í løgtingslógini. Hvør rættindahavari fær rættindi tillutað sum egnir fiskidagar, undantikin í bólki 5, har felags fiskidagar eru.

Bólkarnir í fiskidagaskipanini eru hesir:

Bólkur 2: Trolarar:
- Innara fiskidagaleið
- Ytra fiskidagaleið

Bólkur 3: Línuskip yvir 110 tons

Bólkur 4 A: Útróðrarbátar millum 15-40 tons

Bólkur 4 B: Útróðarbátar størri enn 40 tons á línuveiðu

Bólkur 4 T: Útróðrarbátar størri enn 40 tons á trolveiðu

Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 15 tons á húkaveiðu

Fiskidagatalið fyri hvønn bólk er galdandi fyri fiskiskap á innaru fiskidagaleið, tó undantikið fiskidagar, ásettir fyri ytru fiskidagaleið í bólki 2, sum eisini bert kann brúkast til fiskiskap á ytru fiskidagaleið. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um umbýti av fiskidøgum frá innaru til ytru fiskidagaleið.

Tilvísingarmørk í veiðiregluni

Tilvísingarmørkini í veiðiregluni eru hesi:

Fiskastovnur	Veiðilutfall, lágmark	Veiðilutfall, hámark	Gýtingarstovnur, lágmark, tons
Toskur á landgrunninum	0,24	0,31	29.226
Hýsa	0,17	0,30	22.843
Upsi	0,26	0,33	55.000

Hugtøk í veiðiregluni

Gýtingarstovnurin er tann parturin av einum fiskastovni, ið er gýtingarførur. Veiðireglan leggur upp til, at fiskidagatalið verður skert, um gýtingarstovnurin er niðan fyri lágmark (ICES SSB $B_{trigger}$).

Veiðilutfallið er veiða í mun til fiskibaran stovn. Fiskibarur stovnur er biomassin av 3+ ára gomlum fiski (toskur/hýsa) ella biomassi av 4+ ára gomlum fiski (upsi).

Regla fyri áseting av fiskidøgum

Tá fiskidagatal skal ásetast fyri komandi fiskiár verður farið fram eftir hesum reglum:

1. Fiskidagatalið verður óbroytt, um
   a) gýtingarstovnurin í øllum teimum trimum fiskastovnunum er oman fyri lágmark, $B_{trigger}$, og
   b) veiðilutfallið fyri allar fiskastovnar er millum lág- og hámarkið

2. Fiskidagatalið hjá bólkunum 3-5 verður hækkað, um
   a) gýtingarstovnurin av bæði toski og hýsu er oman fyri lágmark, $B_{trigger}$, og
   b) veiðilutfallið er niðan fyri lágmark fyri bæði tosk og hýsu

3. Fiskidagatalið hjá bólki 2 verður hækkað, um
   a) gýtingarstovnurin av upsa er oman fyri lágmark, $B_{trigger}$, og
   b) veiðilutfallið fyri upsa er niðan fyri lágmarkið

4. Fiskidagatalið hjá bólkunum 3-5 verður lækkað, um
   a) gýtingarstovnurin av antin toski ella hýsu er oman fyri lágmark, $B_{trigger}$, ella
   b) veiðilutfallið er oman fyri hámark fyri antin tosk ella upsa

5. Fiskidagatalið hjá bólki 2 verður lækkað, um
   a) gýtingarstovnurin av upsa er niðan fyri lágmark, $B_{trigger}$ ella
   b) veiðilutfallið av upsa er oman fyri hámark

Tá fiskidagatalið verður broytt, verður tað ásett sum fimm prosent hægri ella lægri enn í fiskiárinum frammanundan.

Onnur stuðlandi stovnsrøktartiltøk

Gýtingarfriðingar: Høvuðsgýtingarleiðirnar hjá toski eru stongdar í gýtingartíðini – antin fyri øllum reiðskapi ella fyri ávísum reiðskapi. Endamálið er at verja gýtingina og at geva fiski frið í gýtingartíðini.

Stongdar leiðir fyri troli: Eini 60 prosent av øllum leiðum í føroyskum øki, har dýpið er minni enn 200 m, eru stongd fyri trolveiðu meginpartin av árinum. Føroya Banki er friðaður fyri allari trolveiðu. Leiðirnar innan fyri 12 fjórðingar eru friðaðar fyri troli, tó ikki um summarið, tá eitt avmarkað tal av trolbátum hava loyvi at trola við serligum flatfiskatroli við skiljirist fyri at minka um hjáveiðuna av toski og hýsu.

Bráðfeingis veiðibann (real time closures): Síðani 1993 hevur Fiskiveiðieftirlitið havt heimild at seta bráðfeingis veiðibann á leiðum, har íblandingin av ungfiski er ov stór. Skiparin á fiskifari hevur skyldu at boða Fiskiveiðieftirlitinum frá, um íblandingin av ungfiski er oman fyri ein nærri ásettan prosentpart av veiðuni í hvørjum háli ella setu. Fiskiveiðieftirlitið ger síðani av, um leiðin skal stongjast og hvussu leingi.

Aðrar friðingar: Í føroyskum sjógvi eru eisini nøkur viðbrekin øki við korallum stongd fyri botntroli.

Hjáveiðireglur: Í fiskiskapi uttan fyri fiskidagaskipanina, har toskur, hýsa ella upsi kann vera hjáveiða, er hámark sett fyri, hvussu nógv hjáveiða er loyvd. Dømi um hetta eru í veiðu eftir uppsjóvarfiski, veiðu eftir havtasku og svartkalva við gørnum og trolveiðu eftir flatfiski innan fyri 12 fjórðingar.

Annað: Í skipanini eru eisini fleiri onnur tiltøk, sum kunnu stuðla undir lívfrøðiliga burðardyggan fiskiskap. Minstamát á fiski, minst loyvda meskavídd í troli og botngørnum, skylda at brúka skiljirist í troli o.a. Síðani 1994 hevur við lóg verið bannað at blaka veiðu útaftur.

Vísindalig ráðgeving

Havstovan ger í november á hvørjum ári stovnsmetingar fyri tosk, hýsu og upsa og ráðgevur landsstýrismanninum um fiskidagatal fyri komandi árið við støði í veiðiregluni. Ráðgevingin kann fevna um onnur stovnsrøktartiltøk.

Avgerðartilgongd

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ásetir við kunngerð fiskidagatal fyri hvørt fiskiár við støði í heimildunum í lógini, veiðiregluni og vísindaligu ráðgevingini. Landsstýrismaðurin lýsir í kunngerð fiskidagatal fyri komandi árið, og hvussu hetta verður tillutað bólkum av rættindahavarum og býtið í bólkinum.

Ráðførsla og onnur ráðgeving

Sett verður ein nevnd við umboðum fyri allar skipabólkar og veiðihættir, sum eru partar av fiskidagaskipanini, umframt fólk frá Havstovuni og fiskiveiðieftirlitinum. Landsstýrismaðurin skal, so skjótt vísindaligu tilmælini eru tøk, ráðføra seg við nevndina, áðrenn avgerð verður tikin um fiskidagar fyri komandi árið, og hvussu fiskiskapurin annars skal skipast tað komandi fiskiárið.

Gildistíð og eftirmeting

Umsitingarætlanin verður sett í gildi samsvarandi ásetingum í lógini um fyrisiting av sjófeingi. Um mett verður, at fyritreytirnar fyri umsitingarætlanini eru grundleggjandi broyttar, ella at umsitingarætlanin ikki røkkur endamálinum, verður nýggj umsitingarætlan gjørd og sett í gildi eftir somu mannagongd.

Veiðireglan skal eftimetast regluliga, tó í minsta lagi triðja hvørt ár, fyrstu ferð, áðrenn fiskidagatal verður ásett fyri fiskiárið 2023.

Fylgiskjal 3: Simulering av veiðiregluni – arbeiðsskjal frá Havstovuni

Simulering av veiðireglu fyri tosk, hýsu og upsa undir Føroyum

Arbeiðsskjal frá Havstovuni í sambandi við arbeiðið at gera umsitingarætlanir fyri botnfisk undir Føroyum. Mars 2019.

Samandráttur

Ein burðardygg veiðiregla fyri fiskiskapin eftir toski, hýsu og upsa undir Føroyum er lýst í hesum arbeiðsskjali. Útrokningar eru gjørdar, sum vísa, at við hesi veiðiregluni eru sannlíkindini fyri, at gýtingarstovnarnir fara undir lágmarkið Blim minni enn 5%. Hetta er vanliga tað, sum skal til, fyri at ICES kann góðkenna veiðiregluna sum burðardygga.


Innleiðsla

Í sambandi við arbeiðið at gera umsitingarætlanir fyri botnfisk undir Føroyum er nevndin komin fram til hesa veiðireglu, tá tað veldst um ásetan av fiskidagatali fyri komandi fiskiár:

Veiðiregla fyri Bólk 2.

Fiskidagatal økt	Fiskidagatal óbroytt	Fiskidagatal skert
• Gýtingarstovnurin av upsa er oman fyri vandamark • Veiðulutfall av upsa er niðan fyri lágmark • Báðar treytir mugu gera seg galdandi um fiskidagarnir skulu økjast	• Gýtingarstovnurin av upsa er oman fyri vandamark • Veiðulutfall av upsa er millum lág- og hámark	• Gýtingarstovnurin av upsa er niðan fyri vandamark • Veiðulutfall av upsa er oman fyri hámark • Um ein av hesum treytunum ger seg galdandi skal fiskidagatalið skerjast

Veiðiregla fyri Bólk 3-5.



Tilvísingarvirðini í veiðiregluni eru hesi:

Stovnur	Veiða í mun til fiskibaran stovn, lágmark	Veiða í mun til fiskibaran stovn, hámark	Gýtingarstovnur Lágmark (B_{lim}) Tons	Gýtingarstovnur Vandamark ($B_{trigger}$) Tons
Toskur á landgrunninum	0,24	0,31	21000	29226
Hýsa	0,17	0,30	16780	22843
Upsi	0,26	0,33	29570	55000

Tað eru harvið tvær skipanir inni í fiskidagaskipanini. Tann eina skipanin er Bólkur 3-5, sum í høvuðsheitum fiskar tosk og hýsu á grunnum vatni. Hin skipanin er Bólkur 2, sum í høvuðsheitum fiskar upsa á djúpum vatni. Tað er sæð sum ein fyrimunur, at hesar skipanirnar virka óheftar av hvørji aðrari. Um til dømis upsastovnurin gerst ov lítil, verður tað tillutaða fiskidagatalið bert skert fyri Bólk 2. Um til dømis toskastovnurin er ov lítil, eigur tað tillutaða fiskidagatalið bert at skerjast fyri Bólk 3-5.

Tilvísingarvirðini í veiðiregluni eru funnin sum úrslit av simuleringum, sum verða nágreinað niðanfyri. Fyri tosk og hýsu er fiskibara stovnsstøddin biomassin av 3+ ára gomlum fiski, og fyri upsa er talan um biomassin av 4+ ára gomlum fiski.

Arbeiðsháttur

Fyrsta stig var at gera sokallaðar "standarddagar" fyri skipabólkarnar, sum kundu samanberast beinleiðis sínámillum. Ein standarddagur var settur ájavnt við veiðievnini hjá Bólki 2 at fiska tosk og

hýsu. Ein standarddagur fyri Bólk 2 var roknaður til at vera 0,26 dagar hjá Bólki 3 og 0,57 dagar hjá Bólki 4 og 1,53 dagar hjá Bólki 5. Brúk av standarddøgum hevur týdning, tá skerjingar í fiskidøgum ikki eru líka fyri allar skipabólkar.

Næsta stig var at rokna samband millum sokallað partielt veiðitrýst per fiskidag og viðurskifti í havinum, so sum nøgd av nebbasild. Sum longu ført fram, so er partielt veiðitrýst per fiskidag fyri Bólk 3-5 stórt, tá lítið er til av nebbasild og øvugt. Fyri upsa var einki samband funnið millum partielt veiðitrýst per fiskidag og viðurskifti í havinum (annað enn, at minni varð veitt av upsa, tá nógv var til av toski, men hetta var ikki tikið við í útrokningarnar).

Triðja stig var at rokna vekt við aldur hjá fiski í mun til viðurskifti í havinum. Nøgd av nebbasild (máld sum nøgd av nebbasild í toskamagum) er tøk frá 1997 og til í dag. Hendan tíðarserian varð longd aftur til 1959 við at brúka eitt positivt samband millum vekt hjá toski 4 ár og nøgd av nebbasild fyri tíðarskeiðið 1997-2004 (2005-2017 var ikki tikið við, tí tá var toskastovnurin so lítil og vektirnar helst størri enn vanligt). Fyri tosk og hýsu var eitt týðiligt positivt samband millum vekt og nøgd av nebbasild (uttan fyri tann størsta fiskin). Fyri upsa var eitt týðiligt negativt samband millum vekt við aldur og samlað tal av upsa í upsastovninum (jú fleiri upsar, jú minni vekt í mun til aldurin).


Fjórða stig var at rokna tilgongd av smáfiski til stovnin. Fyrst var sambandið millum gýtingarstovn og tilgongd lagt inn við einari sokallaðari “Ricker-kurvu”. Sambært hesi kurvu er tilgongdin null, tá gýtingarstovnurin er niðri á null og síðan veksur tilgongdin upp til eitt hámark, tá gýtingarstovnurin er eitt sindur undir helvtini av maksimalstøddini. Síðan minkar tilgongdin so hvørt, sum gýtingarstovnurin gerst størri enn hetta. Næst var at rokna munin millum veruligu tilgongdina og Ricker-kurvuna út frá natúrligum viðurskiftum, so sum nøgd av nebbasild (galdandi fyri tosk og hýsu) ella nøgd av svartkjafti (galdandi fyri upsa). Í simuleringunum vórðu tey útroknaðu virðini fyri tilgongd justerað við eini tilvildarligari variatión á 50%.

Fimta stig var at áseta tilvildarligar nøgdir av ávikavist nebbasild og svartkjafti fram í tíðina. Við tað, at nøgd av nebbasild vanliga er tengt at, hvat var til árið fyri ella árið eftir, vórðu tíðarskeið á 5 ár tikin tilvildarliga úr tíðarskeiðinum 1997-2017, har nøgd av nebbasild er kend. Fyri at sleppa undan møguligum brøttum yvirgongdum, varð eitt miðaltal brúkt til at binda hesi tíðarskeið saman. Út frá hesum simuleraðu virðum varð tilgongd, vøkstur og fiskideyði roknað út heilt fram til ár 2120, har tíðarskeiðið frá 2050 til 2019 varð brúkt sum grundarlag fyri úrslitunum. Gjørdar vórðu 500 simuleringar.


Veiðireglan (omanfyri) varð tikin inn í simuleringarnar og úrslit roknað út.

Úrslit


Við hesi veiðireglu er møguleikin fyri, at gýtingarstovnurin hjá toski fer niður um Blim, minni enn 5% (Mynd 1), og tað sama er galdandi fyri hýsu (Mynd 2) og upsa (Mynd 3). Við veiðiregluni er langtíðarveiðan av toski nær við størstu varandi veiðu, meðan langtíðarveiðan av hýsu og upsa er nakað minni enn størsta varandi veiða, um hædd ikki verður tikin fyri vandanum fyri, at gýtingarstovnurin fer niður um Blim. Virðini í figurunum eru savnað í Talvu 1 umframt miðal veiðitrýst og HR fyri tíðarskeiðið 2050-2119.



Mynd 1. Miðal langtíðarveiða 2050-2119 av toski og sannlíkindi fyri, at gýtingarstovnurin fer niður um lágmarkið Blim = 21000 tons. Sambært ICES skulu sannlíkindini vera minni enn 5%. Hámørkini og lágmørkini fyri veiðu í mun til fiskibaran biomassa eru faldað við faktorum frá 0,8 (t.v.s. 20% minking) og upp til 2 (t.v.s. 100% øking). Veiðireglan svarar til faktor = 1.



Mynd 2. Miðal langtíðarveiða 2050-2119 av hýsu og sannlíkindi fyri, at gýtingarstovnurin fer niður um lágmarkið Blim = 16780 tons. Sambært ICES skulu sannlíkindini vera minni enn 5%. Hámørkini og lágmørkini fyri veiðu í mun til fiskibaran biomassa eru faldað við faktorum frá 0,8 (t.v.s. 20% minking) og upp til 2 (t.v.s. 100% øking). Veiðireglan svarar til faktor = 1.




Mynd 3. Miðal langtíðarveiða 2050-2119 av upsa og sannlíkindi fyri, at gýtingarstovnurin fer niður um lágmarkið Blim = 29570 tons. Sambært ICES skulu sannlíkindini vera minni enn 5%. Hámørkini og lágmørkini fyri veiðu í mun til fiskibaran biomassa eru faldað við faktorum frá 0,8 (t.v.s. 20% minking) og upp til 2 (t.v.s. 100% øking). Veiðiregla svarar til faktor = 1.

Talva 1. Útrokningar av, hvussu veiðireglan virkar í langtíðarhøpi (miðaltøl fyri árini 2050-2119). Veiðireglan leggur upp til, at veiða í mun til fiskibaran stovn verður hildin innan fyri ávís mørk (umframt at gýtingarstovnurin heldur seg oman fyri ávís lágmørk, Blim). Talvan vísir úrslitini fyri ásetingarnar í verandi veiðireglu (við feitum) og eisini, um mørkini fyri veiðu í mun til fiskibaran biomassa verða minkað við 20% ella økt heilt upp til tað dupulta.

	Mørk faldað við:	0.8	0.9	**1**	1.1	1.2	1.3	1.4	1.5	1.6	1.7	1.8	1.9	2
Toskur	Veiða í mun til fiskibaran stovn, lágmark	0.192	0.216	**0.24**	0.264	0.288	0.312	0.336	0.36	0.384	0.408	0.432	0.456	0.48
	Veiða í mun til fiskibaran stovn, hámark	0.248	0.279	**0.31**	0.341	0.372	0.403	0.434	0.465	0.496	0.527	0.558	0.589	0.62
Úrslit	F 3-7 ár	0.26	0.30	**0.34**	0.38	0.42	0.46	0.49	0.52	0.53	0.55	0.57	0.57	0.58
	Tilgongd	15264	15595	**15778**	15842	15841	15750	15429	15394	15079	14857	14628	14392	14312
	Stovnsstødd (tons)	96176	91080	**86148**	81433	77064	73469	69247	67358	65185	62946	61015	59759	59471
	Gýtingarstovnur (tons)	73896	68550	**63543**	58939	54755	51433	47805	46028	44355	42480	40944	40030	39831
	Sannlíkindi fyri, at gýtingarstovnur fer undir Blim	0.00	0.00	**0.00**	0.00	0.00	0.00	0.00	0.01	0.03	0.05	0.07	0.10	0.11
	Veiða (tons)	17030	17862	**18375**	18598	18603	18503	18009	17999	17548	17274	16943	16658	16581
	Miðalstødd í veiðu (kg)	3.20	3.07	**2.95**	2.85	2.75	2.68	2.61	2.57	2.55	2.52	2.49	2.48	2.48
Hýsa	Veiða í mun til fiskibaran stovn, lágmark	0.136	0.153	**0.17**	0.187	0.204	0.221	0.238	0.255	0.272	0.289	0.306	0.323	0.34
	Veiða í mun til fiskibaran stovn, hámark	0.24	0.27	**0.3**	0.33	0.36	0.39	0.42	0.45	0.48	0.51	0.54	0.57	0.6
Úrslit	F 3-7 ár	0.17	0.20	**0.23**	0.26	0.29	0.31	0.33	0.35	0.36	0.37	0.38	0.39	0.39
	Tilgongd	20581	20873	**21086**	21186	21313	21278	20908	21098	20737	20673	20417	20253	20425
	Stovnsstødd (tons)	67588	65145	**62937**	60635	58528	56670	54008	53433	51839	50907	49629	49136	49418
	Gýtingarstovnur (tons)	53350	50726	**48344**	45992	43827	42028	39651	38925	37594	36705	35636	35230	35399
	Sannlíkindi fyri, at gýtingarstovnur fer undir Blim	0.01	0.02	**0.02**	0.03	0.05	0.06	0.08	0.10	0.12	0.14	0.15	0.17	0.17
	Veiða (tons)	8930	9569	**10091**	10462	10721	10897	10753	11000	10789	10836	10688	10654	10721
	Miðalstødd í veiðu (kg)	1.49	1.46	**1.43**	1.40	1.37	1.35	1.33	1.31	1.31	1.29	1.28	1.28	1.28
Upsi	Veiða í mun til fiskibaran stovn, lágmark	0.208	0.234	**0.26**	0.286	0.312	0.338	0.364	0.39	0.416	0.442	0.468	0.494	0.52
	Veiða í mun til fiskibaran stovn, hámark	0.264	0.297	**0.33**	0.363	0.396	0.429	0.462	0.495	0.528	0.561	0.594	0.627	0.66
Úrslit	F 4-8 ár	0.31	0.37	**0.43**	0.51	0.59	0.66	0.71	0.75	0.79	0.81	0.82	0.83	0.83
	Tilgongd	27921	29126	**29964**	30190	30099	29806	29269	28916	28687	28392	28351	28267	28007
	Stovnsstødd (tons)	186897	179632	**172197**	163796	155769	148633	142946	139250	136778	134675	133784	133082	132177
	Gýtingarstovnur (tons)	92336	82433	**73460**	65214	58149	52483	48680	46261	44640	43476	42839	42433	42165
	Sannlíkindi fyri, at gýtingarstovnur fer undir Blim	0.00	0.00	**0.00**	0.00	0.00	0.00	0.00	0.00	0.00	0.00	0.01	0.01	0.01
	Veiða (tons)	35992	38064	**39663**	40581	41228	41479	41306	41194	41168	41003	41014	40985	40766
	Miðalstødd í veiðu (kg)	2.79	2.66	**2.56**	2.49	2.44	2.41	2.40	2.39	2.39	2.39	2.39	2.39	2.39

Simuleringarnar vístu eisini, at veiðireglan væntandi kemur at føra til eina lítla øking í brúktum fiskidøgum hjá Bólki 3-5 fyrstu árini, men at talið síðan minkar spakuliga. Fyri Bólk 2 er væntandi, at brúkta fiskidagatalið minkar spakuliga (Mynd 4).



Mynd 4. Væntað høvuðsgongd í tali á brúktum fiskidøgum fyri Bólk 2 og Bólk 3-5. Tal á fiskidøgum eru sokallaðir “standarddagar”, sí “arbeiðsháttur”.

Umrøða

Veiðireglan sigur í stuttum, at um 1) “okkurt er galið”, t.v.s. at gýtingarstovnar eru ov smáir og/ella veiða í mun til fiskibaran stovn er oman fyri eitt hámark, verða teir tillutaðu fiskidagarnir skerdir við 5%. Um 2) gýtingarstovnar eru nóg stórir, og veiða í mun til fiskibaran stovn er undir einum lágmarki, verða teir tillutaðu fiskidagarnir øktir við 5%. Um hvørki 1) ella 2) eru galdandi, verður eingin broyting í tillutaðum fiskidøgum.

Veiðireglan kann gera, at tað tillutaða fiskidagatalið verður skert í fleiri ár á rað, og tað øvugta kann eisini henda. Eisini er sannlíkt, at fiskidagatalið kann vera tað sama í fleiri ár á rað. Tað er nøgdin av nebbasild/svartkjafti, sum er avgerandi í hesum føri.

Tað kann møguliga undra, at væntaða veiðan av toski og hýsu er lág í mun til miðalveiðu fyri 1990. Orsøkin er, at nøgdin av nebbasild hevur verið lítil eftir 1997 í mun til árini frammanundan. Um nøgdin av nebbasild gerst stór aftur í framtíðini, er væntandi, at gýtingarstovnarnir veksa og veiðan av toski og hýsu eisini verður størri.

Veiðireglan ásetir, at tað tillutaða fiskidagatalið kann skerjast ella økjast við 5% fyri hvørja stilling. Um nøgdin av nebbasild gerst enn minni í framtíðini enn fyri tíðarskeiðið 1997-2018, er væntandi, at bæði miðalveiða og tal av fiskidøgum minka í mun til í dag. Tað øvugta kann henda, um nøgdin av nebbasild økist.

Vert er at leggja dent á, at ein niðurskurður í fiskidøgum ofta eisini merkir eina minking í veiðu, men tað nýtist ikki at merkja, at lítið verður at fáa av fiski. Tá fiskastovnar verða fiskaðir burðardygt, kann veiðan (av toski/hýsu) væntast at verða størri enn seinastu umleið 10 árini. Hinvegin er væntandi, at bæði tal á fiskidøgum og veiðan fara upp, tá náttúruumstøðurnar eru góðar.

Veiðireglan tekur hædd fyri óbrúktum fiskidøgum. Um skipabólkarnir í framtíðini fara at brúka ein størri part av teimum tillutaðu fiskidøgunum, er hugsandi, at “okkurt er galið”, og í slíkum førum verða teir tillutaðu fiskidagarnir skerdir við 5%.

Á sama hátt tekur veiðireglan hædd fyri, at veiðievnini hjá fiskiførunum broytast. Um fiskiførini gerast meira effektiv, er skjótt, at “okkurt er galið”, og teir tillutaðu fiskidagarnir verða skerdir. Hinvegin, um fiskiførini gerast gomul og ótíðarhóskandi, er skjótt, at veiðan í mun til fiskibaran stovn fer niður um lágmarkið og talið á tillutaðum fiskidøgum økt við 5% á hvørjum ári, hetta hendir.

Mynd 4 vísir væntaða høvuðsgongd í fiskidøgum í framtíðini, um skipabólkarnir eru teir somu, og hava somu eginleikar, sum í dag. Fiskidagarnir minka so spakuliga í framtíðini og avgerandi er, at gongdin er áleið tann sama fyri Bólk 2 og Bólk 3-5. Hetta ber í sær, at lutfallið av fiskidøgum millum Bólk 2 og Bólk 3-5 væntandi verður tað sama í einum langtíðarhøpi, t.v.s., at somu prosentvísu stillingar koma at vera galdandi fyri báðar hesar høvuðsbólkar.

Hóast Mynd 4 vísir væntaða høvuðsgongd í fiskidøgum í framtíðini, kann tann veruliga gongdin komandi árini verða nakað annað. Hetta er lýst nærri undir “Ískoyti”.

Tað kann møguliga undra, at úrslitini í hesum riti eru meira “bjartskygd” enn tilmælini frá ICES og Havstovuni seinastu árini. Hetta verður í stuttum nágreinað niðanfyri.

Orsøk 1: Útrokningarhátturin er ymiskur. Útrokningarnar i hesum riti eru gjørdar fyri allar tríggjar fiskastovnarnar tosk, hýsu og upsa undir einum, og sambond eru eisini beinleiðis við brúktar

fiskidagar. Haraftrat eru náttúruumstøður tiknar við í útrokningarháttin. Tær vanligu útrokningarnar hjá ICES taka bert støði í hvørjum fiskastovni sær og hava ongar náttúruumstøður við.

Orsøk 2: Sambandið millum stødd av gýtingarstovni og tilgongd av smáum fiski nøkur ár seinni er ikki heilt tað sama sum brúkt í ICES høpi. Verandi útrokningar byggja á eitt "Ricker samband", meðan ICES útrokningarnar byggja á eina blanding av "Ricker sambandi" og tveimum øðrum sambondum ("Beverton og Holt" og "Hockey stick"). "Ricker sambandið" gevur eitt sindur minni tilgongd við stórum stovni, og tí gevur tað eitt størri burðardygt veiðitrýst. Orsøkin, til at bert "Ricker sambandið" er brúkt í hesum riti, er, at tað er ein einfaldari mannagongd enn at brúka øll trý sambondini.

Orsøk 3: Í ICES høpi verður eisini roknað við óvissum í úrslitunum í sjálvari stovnsmetingini, meðan útrokningarnar í hesum riti eru gjørdar uttan slíkar óvissur. Tess óvissari stovnsmeting, tess lægri burðardygt veiðitrýst. Orsøkin, til at hesar óvissur ikki eru tiknar við í hesum riti, er, at tað ger útrokningarnar einfaldari.

Stillingarnar í veiðiregluni í hesum riti, t.d. mørkini fyri veiðu í mun til fiskibaran stovn, eru ikki neyðturviliga tær endaligu, sum skulu brúkast í framtíðini. Eitt er, at tíðin til at seta hesar stillingar hevur verið avmarkað. Eitt annað er, at stillingarnar møguliga eiga at broytast eitt sindur, um aðrar útrokningar vísa, at tað gevur størri burðardygga veiðu og/ella minni møguleika fyri, at gýtingarstovnurin fer niður um lágmarkið Blim.


Ein høvuðsfyrimunur við einari slíkari veiðireglu, er, at Løgtingið sleppur undan at hava leiklutin sum virkandi veiðiregla. Tað, at Løgtingið hevur leiklutin sum virkandi veiðiregla, ger, at veiðireglan ikki er gjøgnumskygd, og tað er ein forðing fyri, at fiskidagaskipanin kann verða góðkend sum burðardygg av altjóða felagsskapum, so sum ICES ella MSC. Veiðireglan í hesum riti lýkur kravið um gjøgnumskygni og útrokningarnar vísa eisini, at hon er burðardygg.


Ískoyti. Dømi um tal á brúktum fiskidøgum í framtíðini


Mynd 4 vísir væntaða høvuðsgongd í fiskidøgum í framtíðini. Hetta eru miðaltøl fyri 500 simuleringar. Úrslitini frá hvørjari av hesum 500 simuleringunum kunnu vera rættiliga ymisk, og veldst tað nógv um nøgd av nebbasild (Bólkur 3-5) og svartkjafti (Bólkur 2) í framtíðini.


Fiskidagarnir eru sokallaðir "standard-dagar". Ein standarddagur = ein dagur hjá Bólki 2 eftir toski/hýsu á djúpum vatni, sí "arbeiðsháttur". Ein standarddagur er eisini tað sama sum ein dagur hjá Bólki 2 eftir upsa á djúpum vatni.


Hesi 10 dømi vísa, at tað kunnu koma fleiri ár á rað, har fiskidagatalið verður skert ella økt. Tað kunnu eisini koma long tíðarskeið, har fiskidagatalið er tað sama.





















Tal brúktir fiskidagar Bólkur 3-5 ("standard dagar")
12000
10000
8000
6000
4000
2000
0
2000
2020
2040
2060
2080
2100
2120



Tal brúktir fiskidagar Bólkur 2 ("standard dagar")
8000
7000
6000
5000
4000
3000
2000
1000
0
2000
2020
2040
2060
2080
2100
2120



Tal brúktir fiskidagar Bólkur 3-5 ("standard dagar")
12000
10000
8000
6000
4000
2000
0
2000
2020
2040
2060
2080
2100
2120



Tal brúktir fiskidagar Bólkur 2 ("standard dagar")
8000
7000
6000
5000
4000
3000
2000
1000
0
2000
2020
2040
2060
2080
2100
2120



Tal brúktir fiskidagar Bólkur 3-5 ("standard dagar")
12000
10000
8000
6000
4000
2000
0
2000
2020
2040
2060
2080
2100
2120



Tal brúktir fiskidagar Bólkur 2 ("standard dagar")
8000
7000
6000
5000
4000
3000
2000
1000
0
2000
2020
2040
2060
2080
2100
2120


Tal brúktir fiskidagar Bólkur 3-5 ("standard dagar")
12000
10000
8000
6000
4000
2000
0
2000
2020
2040
2060
2080
2100
2120


Tal brúktir fiskidagar Bólkur 2 ("standard dagar")
8000
7000
6000
5000
4000
3000
2000
1000
0
2000
2020
2040
2060
2080
2100
2120


Tal brúktir fiskidagar Bólkur 3-5 ("standard dagar")
0
2000
4000
6000
8000
10000
12000
2000
2020
2040
2060
2080
2100
2120
Tal brúktir fiskidagar Bólkur 2 ("standard dagar")
0
1000
2000
3000
4000
5000
6000
7000
8000
2000
2020
2040
2060
2080
2100
2120


Tal brúktir fiskidagar Bólkur 3-5 ("standard dagar")
0
2000
4000
6000
8000
10000
12000
2000
2020
2040
2060
2080
2100
2120
Tal brúktir fiskidagar Bólkur 2 ("standard dagar")
0
1000
2000
3000
4000
5000
6000
7000
8000
2000
2020
2040
2060
2080
2100
2120


Tal brúktir fiskidagar Bólkur 3-5 ("standard dagar")
0
2000
4000
6000
8000
10000
12000
2000
2020
2040
2060
2080
2100
2120
Tal brúktir fiskidagar Bólkur 2 ("standard dagar")
0
1000
2000
3000
4000
5000
6000
7000
8000
2000
2020
2040
2060
2080
2100
2120